## DAGSINS MEINING

# Røktarheim - loysnin í Suðri

Suðuroyingar kundu ikki semjast um eina ætlan at byggja eitt ellisheim í Vági. Afturímóti fara eftir øllum at døma tær fýra kommunurnar í syðru helvt at byggja eitt ellis- og røktarheim í Vági. Hví kommunurnar í sunnaru helvt og kommunurnar í norðaru helvt ikki kundu semjast er ikki heilt greitt. Men okkurt kundi bent á, at tann gamla toganin millum Tvøroyri og Vág aftur ger seg galdandi. Um hetta eisini er galdandi í hesum føri verður ikki sagt her. Men er tað henda toganin, sum ger seg galdandi, er tað at harmast um. Um so er, verður torført at fáa allar kommunurnar í Suðuroynni at ganga saman í eina kommunu, sum sumir borgarstjórar hava talað fyri.

Fyri fólk uttan fyri Suðuroynna tykist tað rættiliga natúrligt, at eitt ellis- og røktarheim verður bygt í sunnaru helvt í Suðuroynni. Hví skulu sumbingar heilt norður á Tvøroryi á ellisheim, kunnu vit spyrja. Harafturat kemur so eitt meira natúrligt býti í, hvar almennir stovnar liggja og hvar almennar lønir fallla, hóast fólk í flest øllum bygdum arbeiða á almennu stovnunum í oynni, so skattapeningurin fellur niður allastaðni. Men óivað eru ein meginpartur av starvsfólkum helst úr tí staðnum, har stovnurin, tá talan er um so stóran stovn, liggur.

Sambært tí, sum er komið fram um ætlanina at byggja eitt ellisheim í sunnaru helvt, hevði borgarstjórin í Vági bara heimild at ganga við til ætlanina, um øll oyggin var við í ætlanini. Tað eydnaðist ikki, og hvat val høvdu so borgarstjórarnir í sunnaru helvt? Jú, at fara eftir næstbestu loysnini, sum var at savna tær fýra syðru kommunurnar um ætlanina, sum borgarstjórin í Vági upplýsti í Útvarpinum um vikuskifti. Men hetta er ikki fallið í góða jørð í Vági, tí summir vágbingar vilja halda upp á heimildina og seta spurnartekin við, um kommunan ikki bindur seg fyri ov stóra upphdd, nú kommunurnar í norðaru helvt ikki eru við.

Sjálvandi er rætt at seta spurnartekin við hetta, men sambært tí, sum borgarstjórin greiddi frá, so kostar ætlanin Vágs kommunu eina millión áliga, til røktarheimið er goldið. Og ein millión krónur er ikki nógv, tá havt verður í huga, hvussu stórur tørvurin á røktarplássum er, og at allir flokkar eru samdir um, at okkara gomlu skulu hava góðar umstøður á ellisárum. Harafturat kemur, at nógv fólk verða knýtt at røktarheiminum, sum eru rættiliga støðug arbeiði, og er tað nakað, sunnara helvt í Suðuroynni hevur brúk fyri, so er tað støðug arbeiðspláss, serliga til kvinnur.

Nú eru nógvar kenslur knýttar at málinum, og skúlin er vundin upp í aftur, men úr einum óheftum sjónarhorni kann tað ikki vera annað enn rætt, at syðru kommunurnar í Sðuroynni taka seg saman og søkja um loyvi at byggja eitt ellis- og røktarheim í Vági. Tørvurin er har!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin: Útbúgving og økismenning

TJÓÐVELDIS-FLOKKURIN

TÍÐINDASKRIV

**Á fjórða evnisdegum hjá Tjóðveldisflokkinum undir heitinum »Kom og ávirka« var útbúgvingarpolitikkur og økismenningarpolitikkur á breddanum**

Við yvirskriftunum:
- Einar vitanarfremjandi Føroyar
- Einar økismennandi Føroyar

var evnisdagurin hildin í Ungmannafelagshúsinum Virkinum á Sandi. Stevnumið floksins hava á hesum evnisdøgum verið viðgjørd, við grundarlagi í innleggum, kjaki og bólkaarbeiði.

Tingfólkini Hergeir Nielsen og Heidi Petersen løgdu fram stevnumið floksins á økinum.

Marita Rasmussen, samskipari í Vinnuhúsinum, legði fram boð uppá, hvussu hægri útbúgving og gransking skal umskipast í Føroyum, um Føroyar skulu gerast kappingarførar í altjóða samfelagnum.

Annlis Bjarkhamar hevði eina framløgu, har hon mælti til umfatandi broytingar í fólkaskúlanum og í føroyskum skúlaskapi sum heild.

Olga Biskopsstø hevði síðani innlegg um útoyggjamenning og nýggjar ætlanir fyri útjaðaran í Føroyum.

Eftir orðaskifti og bólkaarbeiði, var greiða niðurstøðan, at Tjóðveldisflokkurin skal bróta heilt upp úr nýggjum innan økismenning, útbúgving og gransking:

Politikkurin á hesum økjum hevur higartil í alt ov stóran mun verið bygdur á heimastýrishugsan og eitt stríð millum løgtingspolitikarar um at veita pening til bygningar, asfalt og betong.

Nú skulu orðast greið mál fyri, hvussu útbúgving, gransking og økismenning skulu mennast í teimum frælsu Føroyum. Skúlar, gransking og økini kring landið, skulu ikki verða heft at olmussum og tilvildarligum avgerðum á løgtingi, men skulu hava møguleikar og fortreytir at menna seg á egnum beinum og at draga pening, fólk og íløgur til sín.

Millum annað komu hesi uppskot fram frá fundarfólkinum:

- Stættarmunurin í Føroyum økist í hvørjum – serliga millum fólk í útjaðaranum og í miðstaðarøkinum – og tí skulu útjavningarskipanir setast í verk beinanvegin.
- Størri kommunur kring alt landið skulu hava rásarúm at bjóða framkomnar bústaðarmøguleikar, barnaansing, eldrarøkt, fjølbroyttar skúlar og mentanartilboð til tess at fáa útbúgvið fólk heimaftur til Føroya og stimbra íverksetarum at skapa nýtt í øllum økjum í Føroyum.
- Endamálini fyri fólkaskúlar, miðnámsskúlar og Fróðskaparsetrið skulu orðast heilt av nýggjum í mun til altjóða avbjóðingarnar.
- Alt undirvísingartilfar í fólkaskúlanum skal verða føroyskt.
- Játtanirnar til útbúgving og gransking skulu økjast munandi beinanvegin

# Barnaverndarskipanin í Norðoyggjum og røktarheimsbyggingin í Suðuroy

JÓGVAN VIÐ KELDU

Løgtingsmaður



**– Sitandi landsstýrissamgonga roynir helst at sleppa sum lættast, fyri síðani at lata eina seinni stjórn rudda upp, heldur Jógvan við Keldu**

»Tann ið ger øllum til vildar, ger ongum til vildar«, er gamalt, men kortini ikki minni veruligt í hesum døgum.

Bæði í samgonguskjalinum hjá seinastu samgongu og hesari er stutt men sera greið orðing: »Kommunala sjálvstýrið og ábyrgdin skulu styrkjast við greiðari skilnaði millum lands- og kommunuuppgávur«.

Ofta er lættast politiskt at hopa undan og geva eftir fyri trýsti, hóast vitandi, at hetta fremur skilaloysi og gevur stórar trupulleikar í framtíðini, sum valla slepst úr.

**Sterkari kommunur**

Sum landsstýrismaður í kommunumálum legði eg ikki færri enn tvær ferðir fyri á landsstýrisfundi at fáa framt samanleggingar av føroysku kommununum í størri umsitingarligar eindir, og um ikki hetta kundi fremjast frívillugt, so innan 2009 at fáa hetta framt við løgtingslóg fyri at fáa sterkari kommunur.

Orsøkin til at hetta er neyðugt er, at kommunur uttan Tórshavnar og møguliga Klaksvíkar valla, fyri ikki at siga als ikki, hava møguleika at umsitia fleiri øki enn umsitin verða ídag.

At Norðoyggjar eru slopnar í samstarv við Sunda kommunu á barnaverndarøkinum, og at sunnari partur av Suðuroynni nú fer undir ellis- og røktarheim uttan um norðara partin í oynni, har komandi 13 árini lutvíst verða rentu- og avdráttarfrí, vísir villskapin og visiónsloysi, at tað letur seg gera, áðrenn kommunurnar eru samanlagdar og størri linjur verða lagdar.

Hetta er grundað á veikar og visiónsleysar støðutakanir.

**Mótmælti**

Eg havi fleiri ferðir mótmælt á landsstýrisfundi, at tá tørvur er á peningi, tí inntøkusíðan á fíggjarlógini ikki røkkur, ella tá útreiðslusíðan er ov tung, at gjøld verða løgd á kommunur, eitt lítið dømi er bókasavns-gjaldingarbýtið, at útreiðslur bert verða lagdar á ávíkavist kommunur og vinnulívið, fyri at fáa løgtingsfíggjarlógina at hanga saman og enntá at kalla hetta eina sparing. Her er talan um ábyrgdarloysi.

Tað sum fer at henda í samband við t.d heimið í Suðuroy, at nú landskassin skal gjalda ávísan part og fíggja annan part, verður, at fleiri øki verða løgd út á kommunur og vinnulívið, fyri at løgtingsfíggjarlógin kann hanga saman.

Hetta er og verður skeivur og ábyrgdarleysur politikkur, bert fyri lættast at sleppa undan veruliga at taka støðu, sum bera uppi.

Við hesum roynir sitandi samgonga helst at sleppa sum lættast í løtuni, fyri síðani at lata eina seinni stjórn rudda upp.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.